# Niger fær hjálp úr Føroyum

**Reyði Krossur Føroya hevur longu sent eina upphædd til neyðhjálpina í vesturafrikansku londunum. Og felagsskapurin ætlar at senda líka nógv seinni**

NEYÐHJÁLP
*Snorri Brend*

**Havn:** Hjá Reyði Krossi Føroya hava tey eisini fylgt væl við í kreppuni, sum hevur rakt vesturafrikanska landið Niger.

Og tey hava eisini lagt ætlanir um, hvussu tey – og føroyingar annars – kunnu veita teimum svøltandi eina hjálpandi hond.

Á fundi í Reyða Krossi fyri ólavsøku avgjørdi felagsskapurin at senda 50.000 kr. til neyðhjálpina í hesum afrikanska landinum og londunum har í nánd, ið eisini eru illa rakt av hungri.

– Nú fær so almenningurin høvið at lata eina gávu til hetta arbeiðið. Kundu vit savna inn einar 50.000 kr. aftrat, so hevði tað verið óført, sigur Suni Vinther við Sosialin.



*Børnini eru tey, sum eru ringast fyri. Her er ein mamma komin til eina miðstøð fyri neyðhjálp við hungursrakta barni sínum. Spurningurin er, um hon ikki kom ov seint ....*

### Í desember

Á fundinum í Reyða Krossi varð tosað um, hvussu tey best kundu stuðla teimum neyðstøddu í Niger.

Semja var um, at tey skuldu lata hesar 50.000 kr. til hesi vesturafrikansku londini, ið eru illa rakt av skerpingi og hungri.

Samstundis við hetta hevur felagsskapurin sett út bússur í fleiri enn 150 handlar, matstovur, bensinsølur og aðra staðni kring ein stóran part av oyggjunum.

– Vit miða eftir at kunna senda einar 50.000 kr. ella meiri til tey hungursraktu børnini. Hetta kann gerast longu í desember mánaði, sigur Suni Vinther.

Hinvegin ber eisini til at stuðla innsavningini við at ringja á tlf. 905656 ella senda pening til konto í peningastovnunum, ella snøgt sagt við at gerast limur í Reyða Krossi.

## Føroysk innsavnan til Niger

**Neyðhjálp:** – Vit føroyingar kunnu saktans klára okkum við minni. Og tí átti at borið til hjá øllum at sent pening til tey neyðstøddu.

Samstundis við arbeiðið sítt sum gullsmiður, fylgir Leif Erik Niclasen av Argjum sera væl við í tí kreppuni, sum hevur rakt Niger.

Hann hevur tí sett í verk eina innsavning, hvørs endamál er at veita pening til hungursrakt smábørn í Niger.

Hann hevur stovnað konto'ir í øllum peningastovnunum, har fólk kunnu lata eina upphædd til hetta endamálið.

Og sum hann tekur til: – Peningurin verður latin víðari, tá trygd er fingin fyri at hann kemur á rætta stað!

Leif Erik sigur, at tá ein sær myndirnar úr Niger so sigur tað tóma og úttrykksfulla andlitsbragdið á børnunum alt.

– Tú ivast ikki eina løtu í, at hesi børnini tey hava tað veruliga so trupult, sum eingin okkara dugir at ímynda sær, sigur hann.

Í mun til okkum, so er tað hjá teimum ein spurningur um lív ella deyða, meðan tað hjá okkum meiri er talan um grenj av ymiskum slagi.

– Í gjár var ein fremmandur maður inni í handlinum hjá mær. Hann helt nógv av hesum vælútbygda landinum, og segði, at Føroyar vóru at meta sum eitt paradís.

– Tað hevur hann so púrasta rætt í. Men spurningurin er so, um vit ikki kunnu lata eitt sindur av øllum hesum til tey, ið einki hava, sigur Leif Erik.

Innsavning hansara umvegis peningastovnarnar varir árið út. Til ber eisini at biðja um sjálvboðna fasta flyting.

**sb.**

# Hungurin í Afrika økist og økist

**Milliónir av menniskjum tørva mat í Niger, men eisini grannalondini Mali, Burkina Faso og Mauritania eru hart rakt av skerpingi og minkandi grøði**

HUNGUR
*Snorri Brend*

Neyðhjálpin er byrjað at koma til vesturafrikanska landið Niger.

Her hevur turkur ført við sær, at ein triðingur av teimum 11,5 mió. íbúgvunum í landinum ikki fáa tann matin, tey hava tørv á.

Serliga hesa seinastu vikuna hevur ST merkt, at íkastið frá heimssam-felagnum er farið at gera mun. Hetta megnartak skal bjarga fólki í 100.000 tali – serliga børnum – frá hungursdeyðanum.

### Børn ringast fyri

Ein teirra sum er við í hjálpararbeiðinum er norska Johanne Sekkenes.

– Børnini hava tað sera vánaligt, tá tey koma til klinikkir okkara. Tað er trupult at bjarga teimum, tí støða teirra er so vánalig.

– Mammurnar hava ofta gingið í tímar, tá tær koma fram, og tær eru haraftrat óttafullar fyri hinum børnunum, sum eru heima við hús, sigur Johanne Sekkenes í Læknar Uttan Landamørk við norsku tíðindastovuna NTB.

### 5% doyggja

Læknar Uttan Landamørk hava bjargað 85% av 12.000 børnum sum hava verið til lívbjargandi viðgerð. Men 5% hava verið so veik, at tað hevur ikki verið gjørligt at bjarga teimum.

CARE og aðrar altjóða hjálp-arfelagsskapir eru eisini í holt við tað stóra arbeiðið sum tað er at bjarga mannalívum.

Niger varð rakt av turki og grashoppum sum oyðiløgdu ein stóran part av grøðini í fjør.

Eisini grannalondini Mali, Burkina Faso og Mauritania vórðu rakt av somu ólukkum. Í hesum londum eru í minsta lagi 1,6 mió. menniskju beinleiðis tørva rætta føði. Bara í Mali metir ST at í minsta lagi 1,1 mió. menniskju tørva mat í ár.

# Skjót hjálp er dupult hjálp

**– Vit standa nú í eini humaniterari kreppu, har børn doyggja eisini hesa løtuna, sigur norðmaðurin Jan Egeland**

HUNGUR
*Snorri Brend*

**Niger:** – Heimssamfelagið hevur ikki latið við seg koma um hungurskreppuna í fátæka vesturafrikanska landinum, Niger!

So avgjørdur er norðmaðurin, Jan Egeland, sum er varaaðalskrivari í ST-felagsskapinum fyri humaniter mál.

Kemur hjálpin ikki skjótt fram til Niger, fara í minsta lagi 150.000 børn at doyggja av svongd, metir Egeland, sum eisini samskipar neyðhjálpina hjá ST.

Neyðhjálparfólk í Niger siga frá, at børn nú doyggja sum flugur í neyðhjálparmiðstøðunum í sunnara parti av landinum.

Íalt eru 2,5 mió. fólk, harav 800.000 børn hótt av hungursneyðini í landinum.

– Niger er eitt gott dømi um misrøkta neyðhjálparstøðu, har ein ikki lætst hoyra allar ávaringarnar, segði Egeland herfyri við bretska sjónvarpið BBC.

– Vit standa nú í eini akuttari humaniterari kreppu, har børn doyggja júst í hesi løtuni, segði hann.

Longu í heyst ávaraðu serfrøðingar um, at tørvandi hjálp úr útheiminum til Niger fór at føra til eina hungurskreppu.

Í mai mánaði í ár heitti ST-stovnurin fyri føðivarur, saman við stjórnini í Niger, á alheimssamfelagið um 16 mió. dollarar í neyðhjálp. Men tey fingu nærum einki.

– Nú hava vit so biðið um íalt 30 mió. dollarar, og eg havi teir seinastu dagarnar fingið hópin av positivum tilsøgnum, segði Egeland.

### Norðurlendskur stuðul

Úr Norðurlondum hava bæði Danmark, Noreg, Svøríki, eins og Týskland, Belgia, ES, Sameindu Arabisku Emiratini og USA givið tilsagnir um íalt 10 mió. dollarar í hjálp.

Danmark var millum londini var millum tey londini, sum vóru fyrst við neyðhjálpini.

– Longu 29. juni góvu vit 1,6 mió. kr. til føðivaruætlanina í Niger, sigur Stefan Islandi frá deildini fyri humanitera hjálp í danska uttanríkismálaráðnum.

Í mai gav danska uttanríkisráðið haraftrat eina mió. kr. til privata felagsskapin CARITAS til sama endamál.

## FAKTA

**Niger**

Íbúgvaratal: 11,361 mió.
Fólkabólkar: 56 % hausa, 22 % djerma og onnur uppruna fólkasløg
Stødd: 1.266.700 ferkilometrar
Høvuðsstaður: Niamey
Stýriskipan: Lýðveldi
BTÚ fyri hvønn íbúgva: 800 US-dollarar
Mál: Franskt (alment), hausa, djerma
Religión: 80 % islam, kristin og upprunaligar religiónir